AKTIESELSKABET
FØROYA BANKI

Hovedkontor: THORSHAVN — Stiftet 1906. — Afdeling: TRANGISVAAG

AKTIEKAPITAL OG RESERVER KR. 900,000.

Bankforretninger af enhver Art udføres.

Kontortid 11—3. Lørdag 11—2.

Heildsøla:
TLF. 320 — TUBBAK — TLF. 320
v/ Chr. Dahl-Restorff
Tórshavn.

Vakrir, sera biligir
Klædningar
Biligir góðir, gráir og hvítir
summarskógvar.
Góð og bílig **undirklæði.**
Ymisk sløg av **arbeiðsklæðum.**
Ordrar frá bygdunum postsendast!
tlf. 5. **Trolaradriftin,** tlf. 5.
Tvøroyri.

DREINGJAKLÆÐIR
í stórum úrvali og góðum kvaliteti! Alt gjøgnumfóðrað!
Passar til allar dreingir frá 3—17 ár.
Ordrar út á bygdirnar avgreiðast umgangandi móti postuppkrevjan.
Kathrine Petersens klæðnabúð, Tvøroyri.

Forlovilsisringar
14 og 18 karat fáast best hjá
Niels L. Arge.

som foran antydede paa at drage hans og den danske Arbejders Loyalitet over for de færøske Arbejdere i Tvivl. Thi vi er i Stand til at bevidne, at den danske Arbejder, repræsenteret af Det samvirkende Fagforbunds Formand har den bedste Vijle til fagforeningsmæssig og paa enhver anden praktisk Maade at yde den færøske Arbejderklasse Støtte i dens Kamp for bedre økonomiske og kulturelle Kaar. Arbejderne i Vaag fik ogsaa under Arbejdskonflikten den bedste Lejlighed til at høste praktisk Erfaring af Samarbejdet med Folketingsmand Chr. Jensen som Repræsentant for De samvirkende Fagforbund. Vi tør sige, at uden hans værdifulde Bistand under Forligsforhandlingerne og hans Tilsagn om økonomisk Støtte til om fornøden ved en langvarig Strejke at gennemføre Arbejdernes retfærdige og billige Krav, vilde Arbejderne næppe have opnaaet et saa gunstigt Resultat af Arbejdskonflikten som Tilfælde blev.

Fartplan

for s/s Smiril

Olajugen 1938.

Mandag 25. og Tirsdag 26. planmæssig.
Onsdag 27. Kl. 7 Tórshavn—Sand—Skuo—Dal—Husevig—Skaalevig—Tórshavn.
Onsdag 27. Kl. 19 Tórshavn—Tveraa—Vaag.
Torsdag 28. Kl. 7 Vaag—Tveraa—Tórshavn.
Torsdag 28. Kl. 7 Motorbaad »Kvikk« sejler i Smirils Rute vestover: Tórshavn—Vestmanhavn—Midvaag—Tórshavn.
Fredag 29. sejles ikke.
Lørdag 30. planmæssig.

Tórshavn, 22. Juli 1938.

Administrator.

Tíðindi.

Krúnprinsaparið vitjar Føroyar.

Frígjjakvøldið kom hitt danska krúnprinsaparið til Havnar við »Dr. Alexandrine«. Tey vórðu móttikin av býráðsformanninum og embætismonnunum, og sjálvandi var hópur av fólki á kaiuni. Skúlagenturnar úr kommunuskúlanum góvu krúnprinsessuni eina bukett av vøkrum føroyskum lyngblómum meðan realskúlagenturnar góvu henni eina av útlendskum blómum. Áðrenn farið varð niðan til amtmannin, hagar nakað av fólki var boðið, koyrdi krúnprinsaparið niðan eftir Hvítanesvegnum.

Tíðliga sunnumorgunin fóru tey hiðani við »Dr. Alexandrine«; móttøkan skuldi vera stórsligin, tá tey komu til Reykjavíkar.

Formaðurin

fyri »De samvirkende Fagforbund« í Danmark Chr. Jensen helt hóskvoldið røðu fyri Havnar arbeiðskvinnu- og Havnar arbeiðsmannafelag. Røðan var í tí stóra og heila tann sama, sum hann helt fyri Tvøroyrararbeiðarum, og sum frá er sagt aðrastaðni í blaðnum. Aftaná røðuna vóru nógvir spurningar framsettir, sum hann greiddi frá, og var nakað av orðradrátti.

Frígjjadagin fór Chr. Jensen, fólkatingsmaður til Klakksvíkar at halda fund, og haðani skuldi hann fara til Fuglafirðar, Gøtu, Skálafjørð og Vestmanna. Leygardagin fer hann úr Føroyum heim aftur við »Lyru«.

Ferðamannafør.

Miðvikudagin komu tvey týsk ferðamannafør á Havnina við hópi af ferðafólki. Hesi skip, »Milwaukee«, ið hevur verið eina ferð áður á Havnini í ár, og »General von Steuben« lógu úti fyri Havnini einar 6—8 tímar, og hornorkestur frá báðum vóru í landið og spældu. Leygardagin kom hitt stóra hálendska ferðamannaskipið »Colombia« á Havnina.

Flogfar á Havnini.

Miðvikudagin meðan tey týsku ferðamannaskipini lógu á Havnini kom eitt týskt herskip inn. Hetta síðsta er ikki bygt sum tey herskip, vit eru von at síggja her um leiðir. Tað er ein flótandi stoð fyri herskip. Hetta skip, »Greif« eitur tað, skuldi liggja her og bíða eftir einum flogfari, ið kom í gjár. Tó at vit nú so tíðum hava sæð flogfør í Føroyum, so vakti hetta eins og øll onnur flogfør, her hava verið, miklan eftirans millum fólk.

Statistisk Anmeldelse af Varer.

Landfogeden (Politimesteren) beder os henlede Læsernes Opmærksomhed paa Pligten til at indgive statistisk Anmeldelse for alle Varer, der indføres til Færøerne eller udføres fra Færøerne.

Flere Personer har i den senere Tid maattet vedtage Bøder for Forsømmelse med Afleveringen af Anmeldelse.

Anmeldelserne indgives til Landfogeden og til samtlige Sysselmænd, hvor ligeledes Blanketter erholdes og enhver Oplysning vedrørende Statistikken kan faas.

Føroya Social-Demokrat

kemur út hósdagin 28. juli. — Blaðið, ið út eigur at koma leygardagin 30. juli, fellur burtur.

„Stella Argus"

hevur fingið 100 tons og er farin undan Svalbard til Bjarnaoynna at royna.

Fótboltsleikur

var í gjár millum H. B. og manningina á týska skipinum »Greif«. H. B. vann 12—1.

Fiskiskapurin.

Frá Grønlandi frættist, at »Polarbjørnin« hevur landað 91 skpd. og »Verdandi« 28 tons.

!! Døgurðamatur:
Klippfisk, turran greipifisk
fáa tit í
A. T.
telefon 5.

Panting.

Tað verður her gjørt kunnigt, at eftirstøður av kommuskatti fyri januar og april ársfjórðingar 1938, sum ikki eru goldnar áðrenn tann 1. august í ár, verða sendar pantifútanum til pantingar. —

Tórshavnar býráð, tann 12. juli 1938.

Tilboð uppá bygging av havnunum á Sandi, Haldórsvík og Seyrvági.

	Sand	Seyrvág	Haldórsvík
C. P. Clausen & M. Bak, Kolding-Aarhus	—	70.600	50.200
Vilhelm Tórsheim, Tórshavn	—	74.277	46.930
N. C. Monberg, A/S København	167.500	84.000	60.000
J. Stürup & Prosch-Jensen, København	184.000	72.000	74.000
Steingrim Winther, Tórshavn	235.000	84.000	57.800
(samlað Haldórsv. & Seyrv. 139.000, samlað allar 374.000)			
Chr. Jensen, Kvívík	—	88.400	76.200